













# Hugnalig eldri hús við frálíkum útsýni

Her hava vit eini eldri sethús, sum standa í einum serligum umhvørvi og sum hava sera gott útsýni suður gjøgnum Nólsoyarfjørð og norðureftir.

Innan eru húsini gjørd hugnalig við einum blandingi av gomlum og nýggjum, m.a. eru tey gomlu trægólvini pussað niður.

Húsini eru sera rúmlig, við nógvum kømrum, 2 baðirúmum og 2 stovum, umframt lítlari íbúð í kjallar.

Økið uttan um húsini er stórt og rúmar nógvar møguleikar fyri urtagarðsvirksemi og hevur sera góðar parkeringsmøguleikar.

Fakta
Húsini, sum standa Yviri við Strond 29 í Tórshavn, eru bygd í 1934, men eru so við og við dagførd. Tey eru í trimum hæddum, íalt 210 fermetrar, og grundøkið er heilar 898 fermetrar. Sí meira í lýsingini á hinari síðuni. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst. Tú fært meira at vita frá Inni, eins og tú kanst biðja um at síggja tey á tel. 354200.

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 320 410 • Fax 320 510
inni